Bilurar til 4 persónar

Almannaverkið skal við hesum bjóða út 4-5 stk bilur til 4 persónar. Treytirnar eru fylgjandi

- Bilurin skal nýtast í samband við borgarar sum fáa eina tænastu frá Almannaverkinum skulu koyrast. 4 vaksin fara at brúka bilin.
- Bilurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin verða egnaður til tað. Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar.
- Støddin á bilinum skal verða í "Polo klassanum"
- Levering: Bilurin skal leverast Almannaverkinum, seinast í januar 2018
- Litur: Bilurin skal verða koksgráur / myrka gráur

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Upplýsast skal at tað kann henda at Almannaverkið hevur tørv á fleiri enn 5 bilum tá ið vit taka av tilboð, og tá tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri enn 5 stk bilar, uttan at tað verður boðið út av nýggjum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Alamannaverkið ynskir at royna bilin innan avgerð verður tikin. Hetta fyri at kunna meta um besta bilin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Almannaverkið fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

Vekting: %

Prísur 60 %

Egnaður til endamál 20 %

Góðska 20%

Samla 100

Veitingartíð: Í seinasta lagi jan. 2018

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Tilboðsgevarar kunnu seta spurningar til tilboðið til og við hósdagin tann 26. oktober 2017 kl 1000 Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til hermannm@av.fo . Spurninganir verða síðani viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi fríggjdagin 27 oktober 2017 kl 1000. Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðinum ella ikki, umleið 1-2 vikur, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 31. oktober 2017 kl 1000

Tilboðið skal sendast við telduposti til hermannm@av.fo